## Starvsfólkadagur hjá Shell

Leygardagin skipaði Shell fyri starvsfólkadegi. Leiðin var løgd inn á Muntra, har borðreitt var við løttum bita, áðrenn stravsfólkini fingu tvey skeið, eitt trygdarskeið og eitt søluskeið. Síðani kom meiri lætti og stuttligi parturin av degnum, tá starvsfólkini sluppu at bowla, spæla paintball og koyra go-cart. Stuttligu tiltøkini vóru skipað sum kappingar ímillum ymsu støðirnar, og starvsfólkini løgdu nógv fyri, fyri at vinna. Tá kappingarnar vóru lidnar var farið aftur til Fuglafjarðar, har tey fingu ein betri bita. Heiðursmerki vóru handa fyri dagsins kappingar, umframt at nøkur starvsfólk vórðu heiðrað fyri innanhýsis kappingar, ið hava koyrt gjøgnum ári.



## Ny Alliance ov borgarlig

Tá Naser Khader og onnur stovnaðu Ny Alliance, vóru 11 prosent av donsku veljarunum til reiðar at velja flokkin. Nú siga bara seks prosent, at tey høvdu valt Ny Alliance, um fólkatingsval var í dag. Orsøkin er sambært einari kanning hjá Ugebrevet A4, at flokkurin er ov borgarligur. Tað siga í hvussu er 40 prosent av teimum, sum hava vent flokkinum bakið. Bara 10 prosent siga, at flokkurin er meiri vinstrasinnaður enn væntað.

# Vanligi føroyingurin vil hava Jógvan Fríðriksson til bisp

**Ein veljarakanning hjá Sosialinum vísir, at ongin ivi er um, at vanligi føroyingurin vil hava, at okkara næsti bispur skal vera Jógvan Fríðriksson**

BISPAVAL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Tað er púra greitt, at Hans Jacob Joensen, aftanfyri, er farandi bispur. Men stendur tað til vanliga føroyingin, er Jógvan Fríðriksson, fremst á myndini, tann komandi bispurin*

Hevði vanligi føroyingurin sloppið framat valborðinum, nú okkara næsti bispur skal veljast, hevði ongin ivi verið um úrslitið.

So hevði Jógvan Fríðriksson verið valdur til bisp og tað við einum heilt greiðum meiriluta.

Ein veljarakanning, sum Sosialurin hevur gjørt, vísir, at næstan annarhvør føroyingur, sum hevur tikið støðu til bisbavalið, vil hava Jógvan Fríðriksson til bisp, hevði vanliga fólkið sloppið at valt og hevði val verið nú.

Í kanningini eru 621 tilvildarligir føroyingar yvir 18 ár, spurdir, hvønn tey vilja hava, skal vera okkara næsti bispur.

Av teimum halda 32,5% at tað skal vera Jógvan Fríðrikson, prestur á Gjaranesi. Næststørstu undirtøkuna fær Marjun Bæk, prestur í Kvívík, við 13,2% av atkvøðunum og beint í hølunum á henni liggur Bergur Debes Joensen, prestur í Havn, við 12% av atkvøðunum.

Hini trý valevnini fáa undirtøku frá færri enn 10% av fólkinum.

### Nøkur í iva

Kortini skal leggast afturat, at nógv fólk hava ikki tikið endaliga støði. Soleiðis siga 11,4% av teimum spurdu, at tey vita ov lítið til at taka støðu og so eru eisini nøkur, 3,7%, sum ivast ímillum tvey, ella fleiri valevni.

Men kanningin vísir eisini, at av teimum, sum hava tikið støðu, eru tað heili 45%, ella næstan annarhvør føroyingur, sum vil hava, at Jógvan Fríðrikson, skal vera ovasti embætismaður í kirkjuni. Hinvegin vilja 18,3% hava Marjuna Bæk til Bisp og 17,6% vilja hava Berg Debes Joensen.

Men nú er tað so, at tað er ikki vanliga fólki, sum sleppur at velja bisp. Tað eru tey gott 400 fólkini, sum manna kirkjuráðini og prestaembætini. Og, hvussu tey far at velja, fáa at vita fyrst í næsta mánað.




*Næstan annarhvør føroyingur, sum hevur tikið støðu, vil hava Jógvan Fríðriksson til bisp. Tað hevði úrslitið verið, slapp vanligi føroyingurin at velja og var val í dag*

**Úrslit:**

| | Íalt | Prosent |
|---|---|---|
| Marjun Bæk | 82 | 13.2 |
| Jógvan Fríðriksson | 202 | 32.5 |
| Jákup Reinert Hansen | 37 | 6.0 |
| Bergur Debes Joensen | 79 | 12.7 |
| Uni Næs | 49 | 7.9 |
| Leggi meg ikki úti hatta | 37 | 6.0 |
| Veit ov lítið | 71 | 11.4 |
| Ivist millum 2 ella fleiri | 23 | 3.7 |
| Vil ikki svara | 19 | 3.1 |
| Ógreitt / ósvarað | 21 | 3.4 |
| - - | 1 | 0.2 |
| Tilsamans | 621 | 100.0 |

*Hendan talvan vísir, hvussu vanligi føroyingurin hevði atkvøtt beint nú, sluppu tey at velja bisp*